Vikuskiftis Sosialurin



## Jenis bíðar framvegis

Jenis av Rana bíðar framvegis eftir at fáa at vita, um hann verður ákærdur í málinum, sum hann varð meldaður fyri, fyri meiri enn 15 mánaðum síðani. Tað visti útvarpið hjá Kringvarpinum at siga í gjárkvøldið. Málið við Jenis av Rana snýr seg um, at hann skal hava brotið tagnarskylduna og fráboðanarskylduna, tá hann sum kommunulækni fekk at vita um kynsligan ágang móti eini gentu. Málið er hjá statsadvokatinum í Norðursælandi. Har hevur tað verið síðani september í fjør, men statsadvokatinum vantar upplýsingar um rættarviðurskiftini í Føroyum, sum eru øðrvísi enn í Danmark, og fær tískil ikki farið víðari. Jenis av Rana hevur allatíðina noktað seg sekan.



## Sjey søkja tunnilsstarv

Sjey fólk hava søkt starvið sum stjóri fyri tveimum báðum undirsjóvartunlunum.Tann 28. desember var seinasti dagur at søkja starvið sum stjóri fyri Vágatunlinum og Norðoyatunlinum, og sjey umsóknir komu. Starvið er ársmálssett til fýra ár, og arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna. Bæði menn og kvinnur hava søkt stjórastarvið, sum ætlandi verður sett um stutta tíð, sigur virkandi stjórin, Bergur í Garði, við Dimmalætting.

# Sjúklingatrygd endaði sum valtrøll

**Í 10 ár hevur lógin um sjúklingatrygd ligið óvirkin, tí lógin um endurgjaldsábyrgd ikki eisini er samtykt. Meðan feilviðgjørdir sjúklingar sita við sviusoð, hava landsstýrismenn enn einaferð gjørt sjúklingatrygdina til valtrøll**

HEILSA
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*



*Summi trøll eru fittari enn onnur. Valtrøll eru sjálvdan stuttlig, og landsstýrismenn tykjast ikki fegnir um valtrøllið, Sjúklingatrygd. Føroyskir sjúklingar hava framvegis ikki rætt til endurgjald, um teir verða feilviðgjørd, hóast ríkislógin um hetta fyri fleiri árum síðani kom í gildi í Danmark*

Løgtingið samtykti í 1999 at seta sjúklingatrygginarló gina, sum er ríkislóg, í gildi í Føroyum. Henda lóg skuldi tryggja sjúklingum endurgjald og gera tað møguligt hjá sjúklingum at fáa viðhald í málum um viðgerðarfeilir uttan at fara ígjøgnum long rættarmál.

Men fyri at sjúklingatryggingarlógin kundi koma í gildi, skuldi ein lóg um endurgjaldsábyrgd eisini samtykkjast. Men nú skjótt 10 ár seinni er henda lóg framvegis ikki samtykt.

- Lógin um endurgjaldsábyrgd var klár at leggja fyri tingið í heyst, og ætlanin var, at hon skuldi koma í gildi tann 1. januar 2008, sigur Jacob Vestergaard, fyrrverandi landsstýrismaður í innlendismálum, sum hevði ábyrgd at fáa lógina í tingið.

Men lógin um endurgjaldsábyrgd kom ongantíð á ting, og kom tí heldur ikki í gildi 1. januar í ár. Sjúklingar í føroyska heilsuverkinum hava tí framvegis ikki somu trygd sum sjúklingar aðrastaðni í ríkinum.

### Fleiri ráð og fleiri lógir

Jacob Vestergaard sigur, at tá hann hoyrdi um lógina stutt eftir, at hann varð settur sum landsstýrismaður, fór hann beinanvegin í gongd við at fáa hana dagførda.

- Danska lógin var broytt fleiri ferðir, síðani hon varð samtykt, og vit máttu tí fáa eina dagførda lóg. Tíðliga í heyst var hon klár at leggja fyri tingið, men so var eitt ynski um, at vanlukkutryggingarlógin skuldi leggjast fram samstundis, og tí kom hon aftur í drag, sigur Jacob Vestergaard.

Endurgjaldslógin var í tinginum bæði í 2001 og 2003, men fall í báðum førum burtur orskað av vali, og tí tingsetan endaði. Hesuferð kom hon ikki í tingið, men Jacob Vestergaard sigur, at lógin er púra klár at leggja fram, og hann væntar, at komandi landsstýri fer at raðfesta hetta.

### Lógin skifti ráðharra

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, sigur, at tá landsstýrið varð skipað í 2004, lá arbeiðsskaðatryggingarlógin undir hansara málsøki.

- Vit fóru tí beinanvegin í gongd við at gera lógaruppskotið, sum longu tá hevði verið ávegis í seks ár, liðugt. Í desember 2005 avleveraðu vit so eitt liðugt lógaruppskot til landsstýrismannin í vinnumálum, sum frá 1.1.2006 skuldi hava ábyrgdina av hesum málsøki.

Men Vinnumálaráðið valdi at fara í gongd við málið av nýggjum, aftur út til hoyringar, sum so aftur vóru innarbeiddar í lógaruppskotið.

### Lógin klár men ikki samtykt

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur, at Tryggingareftirlitið staðfesti, at lógin ikki kundi samtykkjast, sum hon var.

- Í heyst var lógin endiliga klár, men vit drógu á bæði borð, um hon kundi leggjast fram, tí lógin var so stór og umfatandi.

Landsstýrismaðurin valdi ikki at leggja lógina fram, og tí var hon heldur ikki løgd fyri samgonguflokkarnar til politiska viðgerð.

- Men hon er komin so langt, at hon er skjót at samtykkja hjá einum komandi landsstýri, sigur Bjarni Djurholm.

Í fyribils hoyringunum, søgdu Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin seg taka undir við uppskotinum, meðan Fólkaflokkurin vildi bíða við sínari tilsøgn, til allar hoyringar vóru liðnar.

Um lógin um endurgjaldsábyrgd fær somu lagnu í einum komandi landsstýri, fer tíðin at vísa. Í hesari setuni endaði hon sum valtrøll.